Sosialurin

Nr. 151 - 8. august 2007

# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit hava einki við burturflytingina at gera, men fólk skulu altíð finna okkurt atfinningarsamt (Gerry McCann).*



*Gerry og Kate McCann avsanna, at tey hava beint fyri Madeleine*

# -Vit hava ikki dripið Madeleine

**Foreldrini hjá Madeleine McCann eru í øðini, eftir at bløð í Portugal hevur borið tíðindi um, at 4 ára gamla Madeleine bleiv ikki burturflutt, men myrd á hotallinum í Paria de Luz**

- Kate og eg eru sannførd um, at Madeleine bleiv burturflutt úr íbúðini, og at hon er á lívi, segði Gerry McCann vi sjónvarpið Sky í gjárkvøldið.

- Hvat hendi henni, vita vit ikki, og vit vita heldur ikki, hvar hon er. Men vit hava ikki dripið hana, segði hann við sjónvarpið.

Fleiri portugisisk bløð siga frá keldum innan løgregluna, at tað tykist rættiliga vist, at eitt ella annað hendi Madeleine McCann inni í íbúðini, har hon lá og svav um kvøldið tann 3. mai. Blóðblettirnir, sum løgreglan hevur funnið í kamarinum, verða nú DNA-kannaðir fyri at fáa staðfest, um teir stava frá bretsku gentuni.

Sambært portugisisku bløðunum hevur løgreglan illgruna tilGerry og Kate McCann, og løgreglan hevur eisini avhoyrt nøkur vinfólk teirra.

# Hava avtalað søguligan fund

**Fyri fyrstu ferð í sjey ár hittast leiðararnir í Norðurkorea og Suðurkorea seinni í hesum mánaðinum**

Tann 28. august fær norðurkoreanski høvuðsstaðurin Pyongyang ein ógvuliga sjáldsaman gest, tá suðurkoreanski forsetin, Roh Moo-hyun kemur hagar at tosa við norðurkoreanska starvsbróðurin, Kim Jong-il. Eitt er, at Roh ongantíð hevur verið har fyrr, men hetta er samstundis fyrstu ferð í sjey ár og aðru ferð yvirhøvur, at ein suðurkoreanskur forseti vitjar grannalandið fyri norðan.



*Suðurkoreanska sjónvarpið vísti myndir av teimum báðum forsetunum*

Tað var tann almenna norðurkoreanska tíðindastovan KCNA, sum bar tíðindini um tann avtalaða fundin, og í Suðurkorea vísti sjónvarpið myndir av teimum báðum forsetunum.

Upprunaliga var ætlanin, at Kim Jong-il skuldi koma til Suðurkorea at vitja. Tá hann fyri sjey árum síðani hitti táverandi suðurkoreanska forsetan, Kim Dae-jung, í Norðurkorea, lovaði Kim jong-il, at næstu ferð skuldi hann fara til Suðurkorea. Men embætismenn siga, at av trygdarávum verður eisini hesin fundurin í Pyongyang. Eitt annað er, at norðurkoreanski forsetin er sera sjáldan uttanlands, og fer hann av landinum, ferðast hann bara við toki.

Formliga eru tey bæði koreonsku londini framvegis í kríggi við hvørt annað, men ein talsmaður hjá suðurkoreonsku stjórnini sigur, at endamálið við fundinum í Pyongyang er at lyfta viðurskiftini millum tey bæði londini upp á eitt hægri stig.

Eygleiðarar í Suðurkorea halda, at tað er Roh Moo-hyun, sum hevur fingið fundin í lag fyri at bøta um sítt umdømi, áðrenn hann fer frá. Hansara forsetaskeið fer at styttast nú, og hann er ikki serliga væl umtóktur millum suðurkoreanar, sigur CNN.

## STUTT SAGT

## Svikaligt í Irak

Irakski orkumálaráðharrin sigur, at tann almenna elveitingarskipanin er í so vánaligum standi, at hon kann steðga hvørja løtu. Lítið mætari er við vatnveitingarskipanini í høvuðsstaðnum Bagdad, og teir seinastu dagarnar hava fólk als ikki fingið nakað vatn partar av samdøgrinum. Sambært ráðharranum standast trupulleikarnir av vantandi viðlíkahaldi, veksandi tørvi og herverki. Bretski hjálparfelagsskapurin Oxfam segði í síðstu viku, at næstan ein triðingur av irakska fólkinum tørvar neyðhjálp.

## Verja hvalin

Amerikonsk herskip, sum eru við í venjingum úti fyri kalifornisku strondini, sleppa ikki at brúka sonarútgerð undir venjingunum. Ta avgerðina hevur dómsvaldið tikið eftir áheitanj frá einum djóraverndarfelagsskapi. Í úrskurðinum stendur, at tað má sigast at vera prógvað, at sonarútgerð órógvar hval, so hann fer av kós og kann enda uppi á turrum. Úrskurðurin hjá dómsvaldinum er galdandi til árslok 2009.

## Funnir aftur

Í februar stjól onkur tríggjar málningar hjá tí kenda listamanninum Pablo Picasso. Tað var eitt abbabarn hjá listamanninum, sum fekk óbodnar gestir, og sum fóru avstað við teimum trimum málningunum. Men nú hevur franska løgreglan funnið teir aftur. Tað frøir uttan iva abbabarnið, tí ein av málningunum, „Maya við dukku“, er júst av henni. Men tað er ikki alt, tí teir tríggir málningarnir eru umleið 350 mió. krónur verdir, skrivar AFP.